

# Faroe Petroleum við í stórari seismiskari verkætlan í Barentshavi

**Jan Müller**

26.02.2014 - 12:17

Oljan.fo

Tilsamans 33 altjóða olju- og gassfeløg eru við í eini kanningarverkætlan í Barentshavinum, sum fevnir um 3D seismiskar kanningar í nýggjum økjum í syðra partinum av Barentshavinum. Hesi økini eru partur av 23. loyvisumfarinum á norska landgrunninum.

Tað er Statoil, sum hevur gingið á odda og hevur átikið sær leiklutin sum fyristøðufelag. Upprunaliga vóru 17 feløg við. Nú er talið tvífaldað.

Tað var eftir áheitan frá norska ráðharraráðnum fyri olju og gassi, OED, at norski áhugafelagsskapurin Norsk olje og gass (systurfelag hjá FOÍB í Føroyum) tók stig til eina

stóra felags verkætlan, sum nú hevur fingið ovurstóra undirtøku millum altjóða oljufeløg og har eisini tí føroyska Faroe Petroleum.

Endamálið við kanningini er at savna inn data frá verandi fundum í nýggja økinum, sum so aftur skulu betra um møguleikarnar fyri at finna nýggjar olju- og gassgoymslur og harvið minka um útreiðslurnar fyri at gera fund.

“Ein tvífaldan av talinum á fyritøkum í verkætlanini vísir, at stigið hevur fingið sera góða undirtøku frá ídnaðinum. Hetta er eisini ein verkætlan, sum fer at minka um útreiðslurnar annars og tryggja góð data eitt nú við at troyta ymsu kompetansurnar hjá feløgunum,” skrivar Statoil á síni heimasíðu.

Eitt av endamálunum við at standa saman um slíka kanning er at minka um møguligar avleiðingar, sum oljuvinnan kann hava á fiskivinnuna.